# Hekla er elsta bilfyritøka í Íslandi

*Hekla er elsta bilfyritøka í Íslandi. Høvuðssætið í einum 12.500 fermetra stórum bygningi á Laugavegi í Reykjavík*




**Hekla, sum er elsta bilfyritøka í Íslandi, varð stovnað fyri 75 árum síðan, í 1933. Fyritøkan hevur spesialiserað seg í sølu og service av bilum og maskinum**

Reykjavík: Bil- og maskinfyritøkan Hekla umboðar bilmerkini Volkswagen, Audi, Skoda, Mitsubishi, Scania, umframt Caterpillar maskinur, Hiab kranar og Goodyear dekk. Fyritøkan hevur seinastu árini selt umleið 2.500 nýggjar bilar um árið og nakað tað sama av brúktum.

Hekla hevur høvuðssætið í einum 12.500 fermetra stórum bygningi á Laugavegi í Reykjavík. Fyritøkan hevur annars umboð og tænastur í øllum teimum størru býunum í Íslandi.

Forstjóri í Hekla er Knútur G. Hauksson, sum í eitt tíðarskeið var stjóri í Samskip í Føroyum.

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



*Bjarki Steingrímsson, Volkswagen sølumaður, og Knútur G. Hauksson stjóri á Hekla. Knútur var eitt tíðarskeið stjóri á Samskip í Føroyum*



*Hekla hevur eina VW Boblu frá 1952 í sínum framsýningarhøli*



*Hekla umboðar m.a. Mitsubishi. Her er ein umbygdur Mitsubishi Pajero*



*VW Boblan hjá Heklu er á einum íslendskum frímerki*

# Finnbogi er 83 ár og framvegis virkin

Reykjavík: Finnbogi Eyjólfsson er eitt sjaldsamt fyribrigdi. Hann er 83 ára gamal og framvegis virkin í stóru bilafyritøkuni Hekla í Reykjavík.

Bilafyritøkan Hekla varð stovnað fyri 75 árum síðan, í 1933, og Finnbogi Eyjólfsson hevur starvast í fyritøkuni 64 ár.

Finnbogi byrjaði sum bilmekanikari og arbeiddi seg uppeftir. Hann hevur verið marknaðarstjóri, arbeitt á lysingardeild og verið PR-manager. Hann hevur eisini staðið fyri ymiskum verkætlanum, sum t.d. at gjørt Volkswagen ambulansir til Landssjúkrahúsið í Føroyum. Hann letur sera væl at samstarvinum við Føroyingar.

mg

*Finnbogi hevur egna skrivstovu á ovastu hædd á virkisbygninginum hjá Heklu á Laugarvegi*



## Sølan av nýggjum bilum hálverað

**Sølan av nýggjum bilum í Íslandi hevur verið sera góð seinastu árini, men í ár er hon minkað niður í eina helvt. Í fjør vórðu t.d. seldir um 15.000 bilar, men sølan í ár verður um 8.000 bilar.**